FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 4. januar 2026

Hoyringarskriv til uppskot um broytingar í sjófeingislógini

Føroya Reiðarafelag hevur fingið uppskot til hoyring viðvíkjandi nøkrum broytingum í sjófeingislógini, og felagið hevur nakrar viðmerkingar til hesar. Seinastu árini hava hundraðtals broytingar verið framdar í sjófeingislógum, og tí eigur Fiskimálaráðið at fara meira hóvliga fram komandi árini.

Í fyrsta umfari er neyðugt at vísa á eina áseting, sum ikki stendur í hesum lógaruppskoti. Á heysti 2023 varð tíðindaskriv sent út alment, har greitt varð frá, at gildistíðin á fiskirættindum verður 10 ár. Eftir táverandi lóg var tíðarskeiðið fyri loyvini tólv ár, og hetta skuldi leingjast á hvørjum ári við lóg.

Fiskimálaráðið boðaði síðani frá, at uppskot um at leingja gildistíðina skuldi leggjast fyri tingið á heysti 2024. Hetta varð ikki gjørt, og nú styttist gildistíðin á rættindunum enn einaferð til stóran ampa fyri reiðaríini. Víst verður á, at fiskiflotin hevur tørv á tryggum og støðugum kørmum, soleiðis at virksemið kann skipast við langskygdum skynsemi.

Hetta er nú vorðin ein stór avbjóðing hjá flotanum, tí at reiðarí skulu greiða fíggingarstovnum frá støðuni og versnandi umstøðum at reka fiskiskip í Føroyum. Hetta kann hava neiliga ávirkan á tær treytir, sum fíggingarstovnar veita reiðaríum, ið hava bygt og keypt nýggj skip.

Víst verður enn einaferð á, at fiskivinnan eigur at hava tryggar karmar kring loyvistíðarskeiðið, og eitt hóskandi tíðarskeið hevði verið 12 ár. Hetta er eitt púra rímiligt krav, sum fiskiflotin hevur mótvegis politisku skipanini, og víst verður enn einaferð á, at vinnan eigur at hava tryggar karmar kring loyvistíðarskeiðið.

Tí eigur landsstýrið at halda orð og leggja uppskot um at leingja loyvistíðarskeiðið fyri tingið í hesum lógaruppskoti.

Skotið verður upp, at frágreiðing um sjófeingislógina og avtalur við onnur lond bert verður løgd fyri tingið annaðhvørt ár smb. §7, stk. 4. Í dag verður henda frágreiðing løgd fram hvørt ár í februar. Reiðarafelagið tekur undir við hesi broyting, men henda frágreiðing kundi hóskandi verið løgd fram fjórða hvørt ár eins og frágreiðing um alivinnu. Hinvegin er ikki neyðugt at leggja slíka frágreiðing fram á hvørjum ári.

Heimildin at skipa fiskiskapin í føroyskum sjógvi verður løgd í eina og somu áseting í §22, stk. 1. Núverandi áseting fevnir ikki um fiskidagaskipanina undir Føroyum, og heimildin at skipa fiskiskapin á Føroyabanka er í serstakari áseting í stk. 2.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Harumframt fær landsstýrismaðurin eisini heimild til at lýsa ásettar føroyskar kvotur í eini almennari fráboðan heldur enn í eini kunngerð. Reglur fyri tann einstaka fiskiskapin skulu framvegis skipast í kunngerð umframt tann yvirskipaða ásetingin av føroyskum kvotum.

Soleiðis sum Reiðarafelagið skilir hesa broyting gevur hon ikki einum landsstýrisfólki aðrar ella víðari heimildir í mun til verandi lóg. Broytingin hevur til endamáls at gera umsitingina ísv. áseting av kvotum lættari og smidligari fyri fyrisitingina og fyri flotan.

Dømið í viðmerkingunum byggir á makrelbýtið, sum er rættiliga fløkt og torgreitt við nógvum ymiskum sløgum av kvotum. Eftir hesum eru lutirnir hjá ymisku bólkunum í fastari legu, og teir broytast ikki frá einum ári til tað næsta. Sera týdningarmikið er, at slík broyting ikki skal kunna nýtast til at broyta eitt býti av kvotum millum bólkar og skip.

Samanumtikið tykist hendan broytingin at vera ein bati, tí at hon ger tað lættari og smidligari at áseta kvotur uttan krav um at lýsa alt árliga í kunngerð, sum kann vera umsitingarliga tung mannagongd. Við hesi fortreyt tekur Reiðarafelagið undir við hesi broyting.

Skotið verður upp at seta eitt nýtt §41a, stk. 3 í lógina. Broytingin hevur við sær, at landsstýrismaðurin kann lýsa bráðfeingis undantak frá regluni um, at 25% av svartkjafti, makreli ella norðhavssild kunnu landast uttanlands. Tó kann hetta undantakið ikki vera longri enn 14 dagar.

Talan er um ein bata, at hetta undantakið kann lýsast skjótt við eini almennari fráboðan. Hinvegin er talan um ein vansa fyri skip og manningar, at undantakið í mesta lagi kann vera galdandi í 14 dagar. Samanumtikið verður mett, at talan er um eina skipan, sum fer at skerja møguleikarnar hjá føroyskum uppsjóvarskipum og manningum og at gera umstøðurnar hjá hesum skipum verri enn í dag. Hetta stendur eisini greitt í viðmerkingunum til ásetingina.

Eftir at Føroyar hava gjørt semjur um makrel og norðhavssild, eru kvoturnar lækkaðar munandi. Tískil er lítið sannlíkt, at bíðirøð fer at taka seg upp, tá ið føroyski flotin veiðir hesi bæði fiskasløgini. Hinvegin er væntandi, at bíðirøð verður sum vant, tá ið svartkjaftur verður veiddur og landaður í tí vanligu vertíðini.

Tí er umráðandi, at undantakið kann vera galdandi í 4 vikur heldur enn í mesta lagi 14 dagar. Um undantakið ikki verður galdandi í fýra vikur, verður mælt til, at broytingin verður strikað og tikin aftur.

Heimildin í §26 at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastum í føroyskum sjógvi og havnum verður við hesum uppskoti víðkað. Endamálið við broytingini er yvirskipað at banna førum undir fremmandum flaggi at taka ímóti vørum og tænastuveitingum, sum stuðla undir at fremja fiskiskap, uttan við loyvi frá landsstýrisfólkinum.

Endamálið er at kunna tryggja, at fremmand fiskifør í ávísum støðum ikki skulu kunna fáa stuðul til fiskiskapin við at fáa vørur og tænastur í føroyskum sjógvi ella havnum.

§26, stk. 2 gevur landsstýrisfólkinum heimild til at geva førum undir fremmandum flaggi loyvi at umskipa veiðu o.tíl. í føroyskum sjógvi og havnum. Sagt verður, at tað er neyðugt at kunna seta treytir, sum eru tillagaðar tí ítøkiliga virkseminum.

§26, stk. 3 er ein nýggj heimild, sum gevur landsstýrisfólkinum heimild til at sýta fyri at geva undantak, tá talan er um veiðu, sum er fiskað í ósamsvari við semjur, sum Føroyar eru partur av. Sum dømi verður nevnt fiskiskapur eftir kongafiski í Irmingerhavinum, har NEAFC hevur samtykt veiðibann, men har onnur lond hava mótmælt samtyktini og tí ikki eru fevnd av henni. Hetta er tí ikki IUU-fiskiskapur, men kortini í stríð við eina semju, sum Føroyar eru partur av.

Føroya Reiðarafelag tekur sum meginreglu undir við, at Føroyar hava slíkar heimildir í lóg, soleiðis at landsstýrisfólk kunnu nokta skipum atgongd til føroyska havn í serligum førum, tá ið virksemi hjá hesum skipum er greitt í stríð við føroysk áhugamál. Tó er sera umráðandi, at henda heimild verður nýtt við stórum varsemi, og øll atlit eiga at verða væl og virðiliga viðgjørd, áðrenn heimildin verður nýtt.

Talan er um víðfevnda heimild, ið kann hava stórar avleiðingar fyri tær fiskiveiðiavtalur, ið Føroyar hava við onnur lond, og tí er altíð neyðugt at sýna hóvsemi ísv. nýtslu av hesi heimild. Hon skal tískil neyvan nýtast í øllum teimum førum, har skip fiska í stríð við avtalur, ið Føroyar eru partur av. Hetta krevur eina nágreiniliga viðgerð í hvørjum einstøkum føri.

Skotið verður upp at gera tað møguligt at avhenda rættindi til felags árskvotur og felags fiskidagar uttanfyri føroyskan sjógv fyri eitt fiskiár í senn. Í galdandi lóg fevna reglur um avhending av kvotum og døgum ikki um avhending av felagskvotum og felags fiskidøgum.

Víst veður á, at hendan broytingin kann betra møguleikarnar hjá føroyskum skipum at gagnnýta verandi kvotur við teimum skipum, ið eru best hóskandi til ávíst virksemi. Reiðarafelagið tekur undir við hesi broyting.

Talan er um at víðka heimildina viðvíkjandi treytum fyri innviging í §34. Broytingin víðkar verandi áseting, so at hon fevnir um treytir fyri innviging, skyldu at skráseta og goyma upplýsingar og góðkenning av innvigingarskipanum. Grundgevingin er, at Føroyar í 2022 krevur, at allur uppsjóvarfiskur verður vigaður við góðkendari skipan, og at upplýsingar skulu goymast í ávíst tíðarskeið.

Reiðarafelagið vísir á, at treytir frá myndugleikum til slík viðurskifti altíð skulu vera hóskandi í mun til tað eftirlitið, sum skal fremjast. Dømi eru um, at eftirlit í fleiri førum verður raðfest hægri enn umstøðurnar hjá skipum og manningum at fremja eitt skynsamt og effektivt virksemi umborð.

Tískil eiga myndugleikar eisini at taka atlit til virksemið umborð, soleiðis at arbeiðið og fiskiskapur ikki verða tarnað óneyðuga fyri at lúka krøv um yvirskipað eftirlit. Týdningarmikið er eisini, at Fiskimálaráðið er við til at tryggja, at treytirnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum eru hóskandi og rímiligar í mun til ta uppgávu, sum eftirlitið skal fremja.

Reiðarafelagið hevur annars onga viðmerking til hesa broyting.

Forboðið fyri útblaking verður víðkað, soleiðis at nú verður bæði bannað at blaka og at sleppa veiðu útaftur í §37, stk. 1. Útblakingarbannið skal fevna um allar hættir at veiða og allan fiskiskap, og ásetingin verður umorðað, so at bannið bæði fevnir um at blaka og at sleppa veiðu útaftur.

§37, stk. 2 hevur framvegis heimild til at geva undantak frá banninum í stk. 1. Sagt verður, at nýggja orðingin eisini hevur týdning fyri at umsita heimildina í stk. 2 at geva undantak, og tað eigur at vera greitt, hvat undantak verður givið frá. Upprunaligu viðmerkingarnar til §37, stk. 2 eru sera lítið ítøkiligar, og tí kann vera trupult at meta um, nær hetta undantakið kann nýtast.

Reiðarafelagið skal í hesum sambandi vísa á, at týdningarmikið er, at føroysk fiskiskip kunnu fáa undantak frá at blaka ella sleppa veiðu útaftur, tá ið hetta í ávísum førum er neyðugt. Talan er um eina yvirskipaða heimild, men dømi eru um, at undantøkini ikki kunnu latast føroyskum skipum, tá ið hetta annars hevði verið rímiligt.

Tá ið forboðið nú verður hert og víðkað, er umráðandi, at spurningurin um undantøkini samstundis verður tikin upp, soleiðis at umstøðurnar hjá skipum og manningum at reka eitt skynsamt virksemi eisini verða tiknar við í eina heildarmeting.

Ætlanin er eisini at geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um talgilda avgreiðslu og gjald fyri avgreiðslur á talgildum pallum. Hetta er ætlað til avgreiðslu av t.d. avhending av fiskiloyvum og veiðiváttanum. Vørn fær nú heimild at krevja, at talgildar loysnir skulu brúkast til summar avgreiðslur.

Eisini er ein áseting um undantøk fyri slíkum avgreiðslum. Reiðarafelagið hevur ongar viðmerkingar til hetta, annað enn at avgreiðsla av fiskiloyvum og veiðiváttanum eigur at vera so smidlig sum gjørligt fyri brúkarar í fiskiflotanum.

Stefan í Skorini, stjóri

Føroya Reiðarafelag

Katrina Michelsen

Emne: VS: Skundhoyring: Broyting í sjófeingislógini (apríl 2026)

Fra: Stefan í Skorini <stefan@industry.fo>
Sendt: 27. april 2026 11:52
Til: Símun Grønadal <Simun.gronadal@ufmr.fo>
Cc: Katrina Michelsen <katrina@ufmr.fo>
Emne: Sv: Skundhoyring: Broyting í sjófeingislógini (apríl 2026)

Halló.

Føroya Reiðarafelag hevur fingið lógaruppskot um at leingja gildistíðina á veiðiloyvum og rættindum til hoyring. Gildistíðin verður longd upp í 10 ár, ið tó krevur, at loyvini verða longd á hvørjum ári eftir hetta. Reiðarafelagið tekur undir við, at gildistíðin verður longd upp í 10 ár.

Tó verður í fyrsta lagið skotið upp, at gildistíðin verður longd upp í 12 ár, eins og lógin frá 2019 ásetti. Í øðrum lagi verður skotið upp, at gildistíðarskeiðið ístaðin hevur eina uppsagnartíð, har løgtingið síðani kann siga loyvini upp. Hetta var skipanin í lóg um vinnuligan fiskiskap frá 1994. Hetta hevði givið føroyskum reiðaríum størri tryggleika fyri sínum virksemi og íløgum.

Reiðarafelagið heitir eisini á landsstýrismannin um at leggja uppskot fyri løgtingið á hvørjum ári um at leingja gildistíðina undir verandi skipan.

Vinarliga / Best regards

Stefan í Skorini

Stjóri

Mobile: +298 739912

E-mail: stefan@industry.fo

P.O. Box 361

Óðinshædd 7

FO-110 Tórshavn

Faroe Islands

FØROYA REIÐARAFELAG